Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	09. februar 2024
Mál nr.:	23/23258-15
Málsviðgjørt:	Terji Beder
Ummælistíð:	16. januar 2024 – 01. februar 2024
Eftirkannað:	16. februar 2024

Uppskot til

Løgtingslóg
um
føroyskan førleikakarm

Virkisøki

§ 1. Løgtingslógin er galdandi fyri allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum.
Stk. 2. Løgtingslógin er eisini galdandi fyri skeið, sum kunnu javnsetast við tær í stk. 1 nevndu útbúgvingar.

Tann føroyski førleikakarmurin

§ 2. Navnið á førleikakarminum er tann føroyski førleikakarmurin, Faroese National Qualifications Framework, FOQF.

§ 3. Førleikakarmurin hevur átta førleikastig, sum fevna um allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar frá fólkaskúla til ph.d.-útbúgving.
Stk. 2. Førleikakrøvini eru stigvís og byggja á vitan, hegni og førleikar.

§ 4. Landsstýrisfólkið góðkennir førleikakarmin.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið flokkar útbúgvingarnar og kann gera nærri reglur um flokking av útbúgvingum.

Námsskipan, námsætlan og prógv

§ 5. Námsskipanir og námsætlanir vísa til førleikakrøvini fyri galdandi førleikastig fyri útbúgvingina.

§ 6. Prógv, sum verða útskrivað á góðkendum útbúgvingarstovni, vísa til galdandi førleikastig sambært føroyska førleikakarminum, umframt evropeiska førleikakarminum fyri lívlanga læru, the European Qualifications Framework for Lifelong Learning, EQF.
Stk. 2. Á hægri útbúgvingum verður eisini víst til førleikakarmin fyri tað evropeiska økið fyri hægri útbúgvingar, the

Framework of Qualifications for the European Higher Education Area, QF-EHEA.
Stk. 3. Í teimum førum, har útbúgvingin verður tikin í samstarvi við útlendskan útbúgvingarstovn, kann eisini verða víst til galdandi førleikastig sambært útlendskum førleikakarmi.

Aðrar ásetingar

§ 7. Landsstýrisfólkið í útbúgvingarmálum ger nærri reglur um førleikakarmin, harundir um námsskipan og námsætlan, prógv, heitir og Diploma Supplement.

Gildiskoma

§ 8. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2025.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Ein nationalur førleikakarmur er ein formliga viðtikin karmur, sum umvegis stigvísar førleikaásetingar verður nýttur til at lýsa støðið á útbúgvingum í einari útbúgvingarskipan, og sum ger tað møguligt at samanbera útbúgvingarnar við útbúgvingar í øðrum londum.

Lógaruppskotið er smíðað við tí fyri eyga at fáa eina heimild til formliga at kunna íverkseta ein føroyskan førleikakarm, sum skal fevna um allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum.

Hetta er eisini partur av einum størri máli, sum snýr seg um at altjóðagera tað føroyska útbúgvingarverkið í síni heild, at gerast partur av Bolognaavtaluni, og annars at nærkast teimum útbúgvingarskráum, sum eru galdandi í Evropa.

1.2. Galdandi lóggáva

Ongin lóggáva er galdandi á økinum. Við uppskotinum verður heimild fingin til vegar, sum loyvir einum føroyskum førleikakarmi, sum er skipaður eftir evropeiskum leisti.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at geva heimild í lóg til ein føroyskan førleikakarm, sum verður skipaður eftir evropeiskum leisti, soleiðis at tær føroysku útbúgvingarnar kunnu lýsast á ein viðurkendan hátt. Hetta gevur teimum føroysku útbúgvingunum størri gjøgnumskygni, og ger tað lættari at samanbera okkara útbúgvingar við samsvarandi útbúgvingar í Evropa og umvent.

Endamálið er somuleiðis at nærkast tí politiska ynskinum um, at Føroyar gerast partur av Bolognaavtaluni, og at hægri útbúgvingar í Føroyum tí verða viðurkendar á jøvnum føti við aðrar útbúgvingar í Evropa. Millum tey krøv, sum fylgja, tá ið eitt land gerst partur av Bolognaavtaluni, er, at ein nationalur førleikakarmur verður lýstur fyri landið.

Við hesum lógaruppskotinum verður heimild givin at kunna lýsa ein slíkan førleikakarm at galda fyri Føroyar. Harvið er talan um eitt uppskot, sum er eitt fet longri á leiðini móti at gerast partur av tí evropeiska økinum fyri hægri útbúgvingar (European Higher Education Area).

Endamálið við einum førleikakarmi er fjøltáttað. Lutvíst er tað at fáa útbúgvingarskipanina í einum landi at hanga betur saman, soleiðis at teir førleikar, sum verða vunnir í útbúgvingarskipanini, kunnu geva atgongd til framhaldslestur, óansæð hvørja útbúgving talan er um. Førleikakarmurin loysir ikki hesar avbjóðingar í sjálvum sær, men tá ein slík skipan er sett í verk, har førleikarnir fyri tey ymisku førleikastigini eru definerað, so gerst tað lættari at loysa slíkar avbjóðingar í útbúgvingarskipanini. Hetta er sera týdningarmikið, tí partur av endamálinum við førleikakarminum European Qualifications Framework for Lifelong Learning (EQF), er eisini at eggja til lívlanga læru, sum einans kann náast skipanarliga, um útbúgvingarleiðirnar og møguleikarnir eru smidlig.

Førleikakarmurin hevur eisini til endamáls at tryggja eina stigvísa menning hjá tí einstaka næminginum/lesandi í skipanini. Hetta verður gjørt við at tryggja, at útbúgvingarstigini blíva

torførari og krevja meira av tí einstaka, so hvørt sum bygt verður omaná útbúgvingarnar. Eisini er tað prinsipp galdandi, at lærugrein, sum longu er staðin á einum stigi í útbúgvingarskipanini, ikki má endurtakast á einum hægri stigi í skipanini. Tað vil siga, at lærugreinir á t.d. fólkaskúlastigi ikki verða endurtiknar á miðnámsskúlastigi ella líknandi. Hetta kann fara at merkja, at tørvur verður á at viðgera og/ella tillaga innihaldið í summum útbúgvingum, fyri at tryggja, at slíkar endurtøkur ikki koma fyri.

Nationalir førleikakarmar hava tó sítt upphav í einum politiskum ynski um at skapa eitt økt flytføri millum tey evropeisku londini, bæði tá tað kemur til lestur, og tá ið tað kemur til arbeiðsmarknað. Hetta er møguliga høvuðsendamálið við førleikakørmunum. Fyri at kunna økja um flytførið, er ein fortreyt, at álit er á teimum ymisku útbúgvingarskipanunum landanna millum. Hetta álitið byggir á felags fatanir av, hvussu útbúgvingarnar skulu skipast, ið er serliga tongt at teimum politisku skjølunum, sum gera seg galdandi á økinum, sum definera standardarnar á økinum. Førleikakarmurin er partur av hesum standardum.

Tann føroyski førleikakarmurin verður skipaður við støði í tveimum evropeiskum førleikakørmum. Hesir eru tann evropeiski førleikakarmurin fyri lívlanga læru (European Qualifications Framework for Lifelong Learning, EQF) og tann evropeiski førleikakarmurin fyri hægri útbúgvingar (Framework of Qualifications for the European Higher Education Area, QF-EHEA). Hetta er við til at skapa gjøgnumskygni í ta føroysku útbúgvingarskipanina, sum ger, at onnur lond betur kunnu fyrihalda seg til tær føroysku útbúgvingarnar. Tað, at tann føroyski førleikakarmurin vísir til báðar teir evropeisku førleikakarmarnar ger eisini, at eitt givið útbúgvingarstig í teirri føroysku útbúgvingarskipanini lættliga kann samanberast við samsvarandi útbúgvingarstig uttanlands og umvent.

Frá føroyskari síðu stavar ynskið um ein føroyskan førleikakarm frá ynskinum um at kunna gagnnýta tær evropeisku útbúgvingarskráirnar, sum finnast, og sum politiskt ynski er um. Hetta er eitt nú, at Føroyar gerast partur av Bolognaavtaluni, sum er ein millumtjóðaavtala um hægri útbúgvingar, har lond í Evropa sjálvboðin binda seg til at innføra tær reglur og skipanir, sum verða samtyktar millum londini, sum eru fevnd av avtaluni. Hetta er eisini fyri at kunna luttaka í Erasmus+, sum er ein ES-skrá, sum stuðlar skiftislestri og samstarvi tvørturum landamørk, tá tað kemur til útbúgving, ungdóm og ítrótt.

Samanumtikið kann tí sigast, at endamálið við tí føroyska førleikakarminum er at

1) skapa gjøgnumskygni í og tilvísing millum ta føroysku útbúgvingarskipanina og Evropeiskar útbúgvingarskipanir, sum grundarlag fyri samanbering,
2) skapa samanhang ímillum føroyskar útbúgvingar,
3) tryggja eina stigvísa læruúrtøku millum útbúgvingarstig og fyribyrgja endurtøku av vunnum læruúrtøkum, og
4) eggja til lívlanga læru.

Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa heimild at skipa ein tílíkan førleikakarm, soleiðis at hesin gerst galdandi fyri ta føroysku útbúgvingarskipanina.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær, at tey formligu viðurskiftini á teimum føroysku útbúgvingunum, so sum námsskipanir og námsætlanir v.m. verða lýst á ein hátt, sum ger, at útbúgvingarnar betur kunnu samanberast við aðrar Evropeiskar útbúgvingar.

Hetta merkir, at útbúgvingarnar verða meira gjøgnumskygdar, og at útbúgvingarnar verða skipaðar á ein hátt, sum onnur lond kenna aftur. Hetta skapar álit á ta føroysku skipanina, sum ger, at brúkbærið og flytførið á útbúgvingunum økist, til frama fyri bæði einstaklingin, vinnuna og samfelagið sum heild.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Hesi hava havt lógaruppskotið til ummælis:

- Løgmansskrivstovan
- Uttanríkis- og vinnumálaráðið
- Almanna- og mentamálaráðið
- Fíggjarmálaráðið
- Heilsumálaráðið
- Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið
- Umhvørvismálaráðið
- Løgmálaráðið
- Undirvísingarstýrið
- Vegleiðingarstovan
- Studni
- Prógvstovan
- Yrkisdepilin
- NÁM
- Fróðskaparsetur Føroya
- Vinnuháskúlin
- Sjónám
- Heilsuskúli Føroya
- Tekniski Skúlin í Klaksvík
- Miðnám í Vestmanna
- Miðnám á Kambsdali
- Miðnám í Suðuroy
- Glasir
- Meginfelag Føroyskra Studenta
- Ráð Teirra Lesandi
- Granskingarráðið
- Vinnuhúsið
- Kommunufelagið

Av teimum, sum hava fingið lógaruppskotið til ummælis, eru afturboðanir komnar frá níggju pørtum, Undirvísingarstýrinum, Fróðskaparsetri Føroya, Yrkisdeplinum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuháskúlanum, Ráð Teirra Lesandi, Meginfelag Føroyskra Studenta, Heilsumálaráðnum og Almanna- og mentamálaráðnum.

Vinnuháskúlin fegnast um lógaruppskotið og tilgongdina við at skapa eitt felags grundarlag fyri samanbering av útbúgvingum í Føroyum og uttanlands. Vinnuháskúlin vísir tó á, at tann føroyski førleikakarmurin sbrt. § 4, stk. 1 hevur sjey førleikastig, meðan tann evropeiski førleikakarmurin EQF og tann danski nationali førleikakarmurin báðir hava átta førleikastig. Av tí at lesandi á Vinnuháskúlanum í flestu førum enda í altjóða vinnu, verður staðiliga mælt

til, at tann føroyski førleikakarmurin eisini verður skipaður við átta stigum, soleiðis at hann fer at líkjast tí evropeiska so nógv sum gjørligt, og sostatt verður lættari at kenna aftur. Hetta hevur eisini týdning fyri tann partin av lesandi, sum seinni fara undir framhaldslestur uttanlands.

Eins og Vinnuháskúlin vísir Yrkisdepilin eisini á, at tað eru fyrimunir við átta førleikastigum heldur enn sjey. Hetta so tann føroyski førleikakarmurin hevur eins nógv førleikastig, sum tann danski førleikakarmurin. Fyrimunirnir á yrkisútbúgvingarøkinum við átta stigum liggja í tí, at ein stórur partur av yrkisútbúgvingunum virka eftir donskum lógarverki, sum er nakað, sum hædd má takast fyri skipanarliga, um hesir førleikakarmarnir ikki fylgjast í stigum. Tí metir Yrkisdepilin, at tað hevði verið betri og einfaldari, um tann føroyski førleikakarmurin hevði átta førleikastig eins og EQF og tann danski førleikakarmurin.

Tilmælið frá Yrkisdepilinum og Vinnuháskúlanum um at hava átta førleikastig heldur enn sjey er tikið til eftirtektar í lógaruppskotinum.

Yrkisdepilin metir, at hugtøkini *vitan*, *hegni* og *førleikar*, sum nevnt í § 3, stk. 2, eiga at verða nærri lýst í lógini, við eini tilhoyrandi allýsing av hugtøkunum. Hetta soleiðis at tað gerst greitt, hvat hugtøkini merkja, og hvussu hesi skulu brúkast.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir ikki, at ein slík allýsing er neyðug í sjálvari lógini, tí hesi hugtøkini ikki hava týdning fyri, hvussu lógin verður umsitin. Tó verður mett, at hetta hevur týdning fyri, hvussu førleikakarmurin sjálvur verður skipaður, og tí eru hugtøkini vitan, hegni og førleikar nærri lýst í teimum serligu viðmerkingunum til § 3, stk. 2.

Yrkisdepilin vísir eisini til viðmerking 2.14, har tað stendur, at lógaruppskotið onga heimild leggur undirliggjandi stovnum ella kommunum, og vil minna á, at landsstýrismaðurin sambært yrkisútbúgvingarlógini einans kann góðkenna útbúgvingar eftir tilmæli frá ráðsskipanini, og at tað er yrkisnevndin, heldur enn landsstýrismaðurin, sum góðkennir námsskipanirnar.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur onga viðmerking til omanfyri standandi áminning, annað enn at tað sambært § 4 í yrkisútbúgvingarlógini er landsstýrimaðurin, sum ásetir yvirskipaðu reglurnar fyri hvørja útbúgving sær, og at førleikakarmurin er at rokna sum verandi av yvirskipaðum slag.

Yrkisdepilin vísir á, at tað ikki er rætt, at lógaruppskotið ongar umsitingarligar avleiðingar hevur, sum tað annars hevur framgingið í tí upprunaliga uppskotinum. Sambært Yrkisdeplinum eru umsitingarligar avleiðingar, í og við at læruúrtøkurnar fyri útbúgvingarnar skulu lýsast við vitan, hegni og førleikum, sum er eitt umfevnandi arbeiði og harvið eisini ein stór kostnaðarlig byrða.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið gevur Yrkisdeplinum rætt í, at har eru umsitingarligar avleiðingar, men at tær fíggjarligu avleiðingarnar í fyrstu syftu mugu sigast at vera avmarkaðar, tá talan er um at lýsa námsætlanirnar í læruúrtøkum, sum byggja á vitan, hegni og førleikar. Eisini verður mett, at tillagingar í námsætlanum eru at rokna sum vanligt virksemi hjá stovnum, sum arbeiða við at menna námsætlanir, og at tillagingarnar tí fara at liggja sum ein natúrligur partur av tí vanliga arbeiðinum, ið sostatt ikki gevur meirkostnaðir sum so.

Eins og Yrkisdepilin vísir Undirvísingarstýrið eisini á, at umsitingarligar avleiðingar eru av lógaruppskotinum. Her verður víst á, at námsskipanir í summum førum eru lýstar í lóg og/ella kunngerð, og at hetta tí kann fara at hava við sær broytingar í ávísum lógum og kunngerðum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið gevur Undirvísingarstýrinum rætt í, at tað í ávísum førum kann fara at hava við sær broytingar í lógum og kunngerðum. Hvar og hvussu hetta fer at raka, kann verða torført at gjøgnumskoða, tí at hugtakið *námsskipan* merkir ymiskt, alt eftir hvar í útbúgvingarskipanini tað verður brúkt. Av tí at semja ikki er um, hvat ein námsskipan er, verður bundið um heilan fingur, við bæði at nevna námsskipanir og námsætlanir. Tað týdningarmesta er, at útbúgvingarnar verða lýstar í vitan, hegni og førleikum, og at tað framgongur á rættan hátt, tað veri seg í námsskipan ella námsætlan ella báðum.

Undirvísingarstýrið mælir til, at námsskipanir gjøgnumgangandi í bæði lógaruppskoti og viðmerkingum verða nevndar áðrenn námsætlanir. Hetta tí at ein námsskipan lýsir alla útbúgvingina, meðan námsætlan lýsir hvørja einstaka lærugrein.

Tilmælið frá Undirvísingarstýrinum er tikið til eftirtektar í lógaruppskotinum, og er tillagað bæði í lógarteksti og í viðmerkingum til uppskotið.

Fróðskaparsetur Føroya mælir til, at heitini á teimum evropeisku førleikakørmunum verða nevnd í § 6, stk. 1 og stk. 2, soleiðis at greitt er, hvønn førleikakarm talan er um. Hetta er tikið til eftirtektar, soleiðis at § 6, stk. 1, nevnir the European Qualifications Framework for Lifelong Learning og § 6, stk. 2, nevnir the Framework of Qualifications for the European Higher Education Area.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ikki viðmerkingar til lógaruppskotið, men tekur undir við málinum um at skapa størri gjøgnumskygni í teimum føroysku útbúgvingunum, og at skapa eitt betri útgangsstøði fyri at kunna samanbera tær føroysku útbúgvingarnar við útbúgvingar uttanlands.

Meginfelag Føroyskra Studenta og Ráð Teirra Lesandi fegnast um uppskotið, men hava onga viðmerking til innihaldið í uppskotinum. MFS vísir tó á týdningin av at seta lógina í verk sum fet á leiðini móti altjóðagerð, Bolognaavtaluni og Erasmus+.

Heilsumálaráðið metir ikki, at lógaruppskotið hevur ávirkan á heilsuøkið, og hevur onga viðmerking til uppskotið.

Almanna- og mentamálaráðið hevur onga viðmerking til uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið, í og við at tillagingar skulu gerast í eitt nú námsætlanum, men av tí at tillaging av námsætlanum liggur innanfyri tað, sum er at rokna sum vanligt virksemi fyri teir stovnar, sum varða av námsætlanum, verður hetta mett at verða kostnaðarneutralt.
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið ber í sær smávegis broytingar í mátanum, útbúgvingarprógv verða útskrivað, og hvussu námsætlanir verða lýstar í mun til tann føroyska førleikakarmin. Hesar broytingar eru m.a., at prógvini skulu vísa til galdandi førleikastig á einhvørjum prógvi, og námsætlanirnar skulu lýsa, hvussu lesandi fáa teir førleikar, sum førleikakarmurin treytar fyri eitt givið útbúgvingarstig. Somuleiðis kunnu skjøl fylgja við prógvum, sum lýsa førleikakarmin og ta føroysku útbúgvingarskipanina, soleiðis at tað verður lættari hjá eitt nú arbeiðsgevarum ella útlendskum útbúgvingarstovnum at skilja, hvørja útbúgving talan er um. Hetta verður í dag gjørt fyri hægri útbúgvingar, í einum sokallaðum Diploma Supplement, og kann eisini fara at galda fyri aðrar útbúgvingar, um landsstýrismaðurin ásetir hetta við nærri reglum.

Uppskotið kann fara at hava við sær, at tað í ein ávísan mun verður tørvur á at tillaga tær lógir og kunngerðir, sum innihalda námsskipanir.

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur positivar avleiðingar fyri fólk undir útbúgving, í og við at útbúgvingar umvegis førleikakarmin betur kunnu samanberast við útbúgvingar uttanlands.

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Reykjavíkaravtalan er ein avtala millum Norðanlond, um at viðurkenna norðurlendsk prógv innan hægri útbúgving. Avtalan er upprunaliga frá 2004, men varð endurskoðað í 2016, tá Føroyar, Grønland og Áland undirskrivaðu avtaluna. Í 2022 varð hon aftur endurskoðað, orsakað av nýggjum ásetingum í Bolognatilgongdini, sum kravdi innihaldsligar broytingar í avtaluni.

Reykjavíkaravtalan byggir á Lissabonsáttmálan frá 1997 um viðurkenning av prógvum (Lisbon Recognition Convention) og á Bolognaavtaluna frá 1999 (Bologna Declaration).

Hóast Føroyar hvørki eru fevnd av Lissabonsáttmálanum ella Bolognaavtaluni, er Reykjavíkarsáttmálin hóast alt undirskrivaður, sum bindur Føroyar til at arbeiða við at niðurbróta markaforðingar- og at styrkja flytførið millum londini, tá tað kemur til hægri útbúgvingar. Við hesum sáttmálanum fylgir eisini, at londini regluliga endurskoða, hvussu flytførið virkar landanna millum, og at hesi taka stig til at innføra tey tól og tær skipanir, sum skulu til, fyri at styrkja álitið millum tær ymisku útbúgvingarskipanirnar, og at fáa flytførið millum londini at virka eftir ætlan. Fyri Føroyar merkir hetta, at arbeiðast skal við ásetingunum í bæði Lissabonsáttmálanum og í Bolognaavtaluni.

Lógin um tann føroyska førleikakarmin er við til at styrkja tær føroysku útbúgvingarnar, hvat viðurkenning viðvíkur. Hetta tí at ein førleikakarmur er partur av teimum krøvum, sum fylgja Bolognatilgongdini, og sum Lissabonsáttmálin eisini byggir á.

Reykjavíkarsáttmálin viðførir onga fíggjarliga, umsitingarliga, umhvørvisliga ella aðra avleiðing fyri landsmyndugleikar ella kommunur. Sáttmálin hevur heldur ongar avleiðingar fyri ávís øki í landinum ella fyri vinnuna. At Føroyar umvegis Reykjavíkarsáttmálan hava bundið seg til at skipa sínar útbúgvingar í samsvari við Evropeiskar standardar ger, at viðurkenningin av teimum føroysku prógvunum veksur. Hóast Reykjavíkarsáttmálin einans viðvíkur hægri útbúgvingum, er hetta sama galdandi fyri allar aðrar førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Lógaruppskotið viðvíkur ikki Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiska mannarættindasáttmálanum ella ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar

Í eini frágreiðing frá Norðurlandaráðnum, dagfest 28. januar 2020, varð víst á, at ávísir manglar eru á útbúgvingarøkinum, sum ger, at sjálvvirkandi viðurkenning av føroyskum prógvum innan hægri útbúgving kann gerast trupul, m.a. tí at Føroyar ikki hava innført ein føroyskan førleikakarm. Hóast frágreiðingin staðfestir, at sjálvvirkin viðurkenning kann gerast trupul, eru ongar kendar markaforðingar, sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið veit um, sum tarna flytførinum hjá føroyskum lesandi ella nýtsluni av føroyskum útbúgvingarprógvum.

Lógaruppskotið er tó partur av at betra tey viðurskiftir, sum frágreiðingin vísir á, og er við til at skriva tær føroysku útbúgvingarnar inn í ein evropeiskan samanhang, sum gevur útbúgvingunum meira gjøgnumskygni, sum harvið økir flytførið fyri bæði lesandi og lærlingar. Uppskotið er sostatt við til at niðurbróta markaforðingar í Evropa, tá tað kemur til føroyskar útbúgvingar og føroyskt útbúna arbeiðsmegi.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið viðførir ongar beinleiðis ella óbeinleiðis skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið viðførir ongi gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið staðfestir, at landsstýrismaðurin góðkennir tann føroyska førleikakarmin, og at landsstýrismaðurin flokkar útbúgvingarnar eftir førleikakarminum. Harafturat verður givin landsstýrismanninum heimild at gera nærri reglur um flokking av útbúgvingum.

Landsstýrismaðurin fær somuleiðis heimild at gera reglur um førleikakarmin, harundir um námsskipan og námsætlan, prógv, heitir og Diploma Supplement, ella samsvarandi fylgiskjøl, ið verða latin saman við prógvum. Førleikakarmurin sjálvur verður lýstur sambært hesum reglum.

Lógaruppskotið leggur onga heimild til undirliggjandi stovn ella kommunur.

Lógaruppskotið viðkemur ikki løgfrøðiligum avgerðum fyri borgarum, og er tí heldur ikki skerjandi í mun til kærumøguleikar hjá borgarum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið kann við tíðini fáa ávísar fylgibroytingar, eitt nú tá talan er um at tryggja, at lærugreinir á ávísum stigum ikki endurtaka seg á fleiri førleikastigum í skipanini. Hetta krevur tó nærri viðgerð, áðrenn sigast kann meira um hetta.

Av tí at lógaruppskotið er knýtt at evropeiskum útbúgvingarpolitikki, kunnu krøvini til førleikakarmin broytast sum frálíður, og tað kann hava við sær aðrar avleiðingar. Her skal havast í huga, at førleikakarmurin QF-EHEA er partur av Bolognatilgondini, sum er ein aktiv tilgongd, sum við tíðini hevur broytilig krøv til tær hægri útbúgvingarnar við sær. Hvørjar hesar

broytingar kunnu vera, er ilt at gita um, men hugsandi kunnu slíkar broytingar hava aðrar avleiðingar við sær, tó at vit ikki kenna tær í dag.

Lógaruppskotið stuðlar beinleiðis undir fjórða heimsmál, sambært teimum 17 heimsmálunum hjá ST um dygdargóða útbúgving og møguleika fyri lívlangari læru.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Próvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar eru at rokna sum formliga góðkendar útbúgvingar, sum geva atgongd víðari í útbúgvingarskipanini, og sum hava reglur um próvtøku staðfesta í lóg ella kunngerð. Hetta fevnir um fólkaskúlan, eftirskúlar, maritimar útbúgvingar, útbúgvingar innan heilsu- og umsorganarøkið, yrkisútbúgvingar, gymnasialar útbúgvingar, stuttar framhaldsútbúgvingar og hægri útbúgvingar. Hetta fevnir ikki um barnagarðar, frítíðarskúlar, háskúlar og húsarhaldsskúlar. Hetta fevnir sum útgangsstøði heldur ikki um kvøldskúlar og serligt skipað skúlatilboð, tó at partar av hesum kunnu skipast eftir førleikakarminum, sum lýst í stk. 2.

Stk. 2. Skeið, sum kunnu javnsetast við partar av einari formligari útbúgving, verða fevnd av førleikakarminum. Hetta kann til dømis vera málskeið, sum eitt nú føroyskt sum annaðmál. Føroyskt sum annaðmál er ikki at rokna sum ein útbúgving, men eitt málskeið, ið er lýst eftir málstiganum *Common European Framework of Reference* (CEFR), og verður síðustillað við onnur mál, t.d. við at geva atgongd til framhaldslestur í útbúgvingarskipanini. Hetta kundi eisini verið eitt yrkisskeið, sum er samsvarandi einari yrkislærugrein, og sum síðan verður javnsett við nevndu yrkislærugrein.

Hóast flestu skeið í kvøldskúlunum ikki eru skipað sum førleikagevandi skeið, vera summi skeið av hesum slag boðin út í hesum skúlum.

Serligt skipað skúlatilboð verða í dag skipað eftir *Open College Nework* (OCN), sum er ein skipan, sum gevur prógv í ítøkiligum førleikum, sum kunnu nýtast til ítøkiligar arbeiðsuppgávur á arbeiðsmarknaðinum. Hóast skipanin í dag ikki er løgd soleiðis til rættis, at hon leggur seg uppat skipaðum útbúgingartilboðum, sum eru í tí føroysku útbúgvingarskipanini, og sum verða fevnd av førleikakarminum, ber til at víðka hesa skipanina, soleiðis at hesi skúlatilboðini verða fevnd av førleikakarminum, skuldi hetta verið ynskiligt í framtíðini.

Onnur og styttri skeið, so sum vápnaskeið, fyrstuhjálparskeið, koyrikort og líknandi eru ikki fevnd av lógini.

Til § 2
Heitið National Qualifications Framework, (NQF), er eitt yvirskipað hugtak, sum fevnir um nationalar førleikakarmar, og sum ofta verður brúkt, tá ið nationalir førleikakarmar yvirhøvur verða umrøddir. Tí verða teir nationalu førleikakarmarnir umrøddir við øðrum heitum, sum teingja tann ítøkiliga førleikakarmin at einum ítøkiligum landi.
Tann føroyski førleikakarmurin verður á føroyskum nevndur tann føroyski førleikakarmurin, meðan hann á enskum fær heitið The Faroese National Qualifications Framework, við styttingini FOQF, har FO vísir til landakodu og QF er stytting fyri Qualifications Framework.

Til § 3
Lýsing av førleikastigum í førleikakarmi.

Eitt førleikastig er eitt úttrykk fyri nøkur ítøkilig førleikakrøv, sum eru lýst í vitan, hegni og førleikum. Hvørt førleikastig hevur sína lýsing, og lýsingarnar byggja omaná hvørja aðra í mun til teir førleikar, sum í yvirskipaðan mun verða kravdir fyri tær útbúgvingar, sum liggja á teimum ymisku førleikastigunum. Tey ítøkiligu førleikakrøvini fyri hvørt førleikastig verða nærri lýst í førleikakarminum, sum landsstýrismaðurin sambært § 4 góðkennir.

Stk. 2. Hugtøkini vitan, hegni og førleikar eru lýst eftir dagførdu útgávuni av European Qualifications Framework for Lifelong Learning frá 22. mai 2017. Ein munur er tó, at har EQF nýtir orðingina "responsibility and autonomy", brúkar tann føroyski førleikakarmurin hugtakið "førleikar", eins og hini norðurlendsku londini eisini gera. Hugtøkini verða lýst sum fylgjandi:

- Vitan: skilt sum antin ástøðilig ella faktuell vitan.
- Hegni: skilt sum fatanarligt ella verkligt dugnasemi.
- Førleikar: skilt sum skynsom og ábyrgdarsom nýtsla av vitan og hegni.

At førleikakrøvini eru stigvís merkir, at tey byggja á hvørt annað, og gerast alsamt strangari, longri ein kemur upp eftir stiganum.

Til § 4

Stk. 1. Tá ein førleikakarmur verður skipaður eftir EQF og QF-EHEA, er tað ein treyt, at landsstýrismaðurin formliga góðkennir førleikakarmin, áðrenn hesin fær gildiskomu. Førleikakarmurin sjálvur verður lýstur í kunngerð.

Stk. 2. Sum útgangsstøði er tað landsstýrismaðurin, sum flokkar útbúgvingarnar eftir førleikakarminum. Tó verður heimilað landsstýrismanninum at gera nærri reglur um flokkingarnar, soleiðis at nærri krøv verða sett, sum definera tey ymisku støðini. Hetta krevur tó eitt størri fyrireikingararbeiði.

Til § 5

Námsskipanir og námsætlanir skulu altíð hava eina greiða tilvísing til førleikakrøvini fyri galdandi førleikastig í førleikakarminum. Her verður víst á, hvussu útbúgvingin fyriheldur seg til førleikakrøvini, og hvussu hesi verða rokkin. Soleiðis verður tryggjað, at næmingar og lesandi røkka teimum førleikakrøvum, sum eru fyri tað givna útbúgvingarstigið.

Til § 6

Fyri at tey føroysku prógvini skulu vera lættari at kenna aftur uttanlands, skulu tey vísa til, hvat stig í EQF útbúgvingin samsvarar við.

Stk. 2. Umframt tilvísing til EQF, skulu hægri útbúgvingar eisini vísa til førleikakarmin hjá Bolognalondunum, QF-EHEA. Hetta er somuleiðis fyri at gera prógvini lættari at kenna aftur uttanlands.

Stk. 3. Summar útbúgvingar verða í dag veittar í samstarvi við danskar útbúgvingarstovnar, og eru tí ein blanding millum føroyskar og danskar útbúgvingar. Hetta er galdandi fyri ávísar yrkisútbúgvingar, har lærutíðin er í Føroyum, men skúlagongdin er í Danmark. Hetta er eisini galdandi á hægri námi á Glasi, har stuttar framhaldsútbúgvingar verða veittar, sum fylgja donskum námsætlanum, umvegis danskar útbúgvingarstovnar. Søguliga hava útbúgvingar eisini verið veittar í samstarv við onnur lond, so sum Skotland, eins og formligar útbúgvingar eisini hava verið skipaðar á Fróðskaparsetri Føroya, har lesandi hava verið knýtt at fleiri ymiskum universitetum.

Við tað at vit eru eitt lítið oyggjaland, við einum lítlum fólkagrundarlagi, og tørvi á fjølbroyttum møguleikum, er eisini tørvur á ásetingum, sum loyva meira smidligum samansetingum, tá tað kemur til tær útbúgvingar, sum verða veittar og tey prógv, sum verða latin. Hesin tørvurin fer væntandi at vaksa, tá ið arbeiðið við øktum møguleikum fyri skiftislestri, so sum luttøku í Erasmus+, er komið longri á leið.

Ásetingin ger tað sostatt møguligt, at vit í einum føroyskum prógvi vísa til útlendskar førleikakarmar.

Lógin forðar ikki fyri, at tað eisini verður víst til tann føroyska førleikakarmin, men ásett er, at landsstýrismaðurin kann gera nærri reglur um prógv og tilvísing til førleikakarmin.

Til § 7
Gevur landsstýrismanninum heimild at gera nærri reglur um tey umsitingarligu viðurskiftir, sum hava við førleikakarmin at gera.

Til § 8
Áseting um gildiskomu.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 7. mars 2024

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl

1. Hoyringarsvar frá Undirvísingarstýrinum
2. Hoyringarsvar frá Fróðskaparsetri Føroya
3. Hoyringarsvar frá Yrkisdeplinum
4. Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
5. Hoyringarsvar frá Vinnuháskúlanum
6. Hoyringarsvar frá Ráð Teirra Lesandi
7. Hoyringarsvar frá Meginfelag Føroyskra Studenta
8. Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
9. Hoyringarsvar frá Almanna- og mentamálaráðnum